

## Glaður vegna føroyingar

Eftir dystin flokkaðust fjølmiðlarnir um italska málverjan Gianluigi Buffon. Hann gav sær góðar stundir at tosa við fjølmiðlafólkini, og svaraði tolin hvørjum einasta spurningi. Fyri føroyingar var tað serliga áhugavert at vita, hvat hann helt um málið, sum Rógvi Jacobsen gjørdi, og stóri málverjin svara blídliga, tá hann varð spurdur um hetta. – Eg kann siga, at eg við hesum hjálpti øllum og gjørdi øll glað, svaraði Buffon flennandi, men legði so aftrat: – Sjálvandi er tað keðiligt at fáa mál ímóti sær, og tað eri eg eisini keddur um. Men eg eri glaður hansara (t.e. Rógvi Jacobsen, blðm.) vegna, og vegna Føroyar, tí hetta er eitt søguligt mál hjá teimum, segði Gianluigi Buffon millum annað.

## Vildu havt javnleikin

- Sjálvandi vildu vit havt javnleikin, men eg eri kortini nøgdur við dystin, segði ein flennandi Súni Olsen, beint sum dysturin móti Italia var av. Fáur mundi ivast í, at Súni hendan dagin var ein tann besti spælarin á føroyska liðnum, men spurdur, hvørt hetta var hansara besti dystur nakrantíð, vildi hann ikki geva eitt heilt greitt svar. – Nú havi eg spælt nokk so nógvar dystir, men hetta var avgjørt ein av teimum góðu. Tað er heilt sikkurt, helt Súni eftir dystin.

## Føroyar spældu framúr væl

**– Hatta var eitt framúr gott avrik frá tykkara síðu, og eg haldi, at føroyska liðið spældi sera, sera væl segði Alessandro del Piero**

SAMRØÐA
*Rólant Waag Dam*

Eftir at vera komin úr umklæðingarrúminum eftir dystin, og hava prátað við nógvu italsku fjølmiðlarnar, fingu vit hála Alessandro del Piero til síðis og spurdu vit hann, hvat hann helt um dystin.

– Tað var ein strævin dystur, men ein týdningarmikil sigur, svaraði del Piero stutt. Tá vit síðani spurdu hann, hvat hann helt um avrikið hjá føroyingum, gjørdist Alessandro del Piero meiri prátingarsamur.

– Hatta var eitt framúr gott avrik frá tykkara síðu. Vit vita, at føroyska liðið hevur tapt stórt áður, men eg haldi, at tit í kvøld spældu sera, sera væl, segði Alessandro del Piero, sum hevði hug at ávarað skotar, sum nú koma henda vegin.

– Hvør einasti dystur í Evropa er strævin eftirhondini, og Skotland má heilt víst spæla væl, fyri at fáa ein sigur mikudagin, vísti Alessandro del Piero á.

Alessandro del Piero leikar dagliga við Juventus úr býnum Torino. Hann hevur júst tryggjað sær sætið aftur í bestu italsku deildini, eftir at liðið var dømt at flyta niður í næstbestu deildina í fjør. Alessandro del Piero gjørdist eisini toppskjútti í Seriu B, og er tann aktivi spælarin, sum hevur skotið flest mál fyri Italia – 27 mál í 82 dystum.

# Føroyingar spæla við hjartanum

**– Vit vita, at føroyingar áður hava fingið góð og óvæntað úrslit, og eg tað skuldi undra meg nógv, um Føroyar ikki vinna onkran dyst í hesi undankappingini, sigur Marco Materazzi**

SAMRØÐA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Ivaleyst vóna italiumenn, at spádómurin hjá Materazzi um føroyskt stig í undankappingini fer at halda. Til dømis við javnleiki ella sigri mikudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Eftir dystin leygarkvøldið eydnaðist tað okkum at fáa nøkur orð burtur úr Marco Materazzi, sum fyri kortum vann italska meistaraheitið við stórfelagnum Inter, sum er úr Milano. Hóast tepra sigurin á Føroyum var hann nøgdur.

– Tað var torført at spæla her, men tað góða við dystinum, er sigurin, tí við honum liggja vit nú nummar tvey í bólkinum, helt Marco Materazzi fyri, og grundgav so víðari fyri hesum:

– Tá vit fríggjadagin hugdu aftur um okkum á stigatalvuni, so vóru liðini niðanfyri okkum ikki so mong. Í dag sær tað heilt øðrvísi út, tí nú eru nógv lið niðanfyri okkum, segði hann.

Marco Materazzi vísti síðani á, hvussu týdningarmikil dysturin móti Litava verður mikudagin.

– Tað verður ein sera týdningar mikil dystur. Ja, faktiskt tann týdningarmesti í hesari undankappingini higartil.

### Føroyingar fáa úrslit

Spurdur um, hvat hann helt um dystin sum heild, svaraði Marco Materazzi, at tað var strævið at spæla á Tórsvølli, og at føroyingarnir gjørdu uppgávuna trupla hjá italiumonnum.

– Hetta var hart, men tað vistu vit, at tað kundi blíva. Tí hóast føroyingar ikki eru heimsins bestu leikarar, so spæla teir við hjartanum, segði vælvaksni verjuleikarin úr Inter.

Italsku fjølmiðlarnir, sum sjálvandi eisini tráspurdu Marco Materazzi, høvdu hug at rógva upp undir, at italska liðið hevði undirmett føroyingarnar. Hesum aftur-vísti hann tó staðiliga.

– Sjálvandi gjørdu vit ikki tað. Vit undirmettu ikki Føroyar. Men uttan mun til úrslitið, er sigurin tað einasta sum telur, staðfesti Materazzi, og segði síðani soleiðis:

– Eg veit, at føroyingar áður hava fingið góð og óvæntað úrslit, og eg tað skuldi undra meg nógv, um Føroyar ikki vinna onkran dyst í hesi undankappingini, segði Marco Materazzi.

# Skulu njóta upplivingarnar

**Christian Lamhague Holst er fegin um møguleikan, sum hann hevur fingið við føroyska landsliðnum. Líkamikið, um avbjóðingin eitur Italia ella Georgia**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Hóast hann fegin vildi skorað upp á møguleikan, so er tað ikki nakað, sum fær Christian at liggja í andvekri, kortini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

- Hetta er sjálvandi ein partur av tí. Men tað er ikki so, at eg bara vil spæla á landsliðnum, tí onkrir stórdystir eru ímillum. Mær dámar væl at vera við á liðnum, og eg eri errin av at umboða Føroyar

Soleiðis segði Christian Lamhauge Holst, tá vit eftir dystin leygarkvøldið spurdu hann, hvørt tað júst vóru slíkar uppgávur, sum eggjaðu honum at spæla fyri føroyska landsliðið.

Mong mettu undan dystinum, at Holst hesa ferð skuldi fáa møguleikan frá byrjan, men hóast tað ikki gjørdist støðan, so hevði spælarin sjálvur einki at finnast at.

- Tað hugsaði eg nú ikki so nógv um. Eg haldi, at Andrew gjørdi eitt fantastiskt arbeiði, og avtalan var, at hann skuldi stríða seg flatan. Og tað gjørdi hann. Eftir tað fekk eg kjansin, og so var tað bara um at gera sítt allarbesta. Og tað haldi eg, at allir gjørdu. At vit so ikki vinna, gerst ikki við. Vit koma nokk ikki til nakað endaspæl kortini, so tað ræður um at njóta upplivingarnar og fáa okkurt gott úrslit á vegnum.

*Sjálvur hevði tú møguleikan at skapa tí heilt stóru sensatiónina?*

- Tað hevur tú so púrasta rætt í, og sjálvandi kann eg iðra meg um tað. Men tað er nú ikki so, at eg standi eftir við einum vónbroti. Tað kundi sjálvandi verið stuttligt, um vit framvegis gingu runt vøllin og klappaðu, men tað fái eg ikki brúkt til nakað.

So sensatiónin kemur kanska mikudagin ístaðin?

- Tað má hon gera. Vit hava jú verið nær við nakrar ferðir í seinastuni, so hesa ferð munnu stigini koma, sigur ein smílandi Christian Lamhauge Holst.